

## Nýggjan trolara

Stóra íslendska felagið Samherji, sum hevur tætt samstarv við føroyska reiðarafelagið Framherji, hevur fingið ein frystitrolara afturat. Trolarin, sum hevur fingið navnið Oddeyran, kom til Akureyrar um vikuskiftið. Hann er 55 metrar langur, 12,2 metrar breiður og hevur 4.000 hesta høvuðsmotor. Trolarin, sum er fimm ára gamal, er keyptur úr Noregi. Morgunblaðið skrivar, at Oddeyran kann royna við tveimum trolum samstundis.

## Nýggjur bygningur

Smápartafelagið Ídni í Klaksvík byggir í løtuni nýggjan bygning uttan fyri Norðnorg, og nú er bygningurin reistur. Hann er umleið 1.250 fermetrar til støddar og skal hýsa smiðjuvirkseminum hjá felagnum. Sp/f Ídni húast í løtuni í einum bygningi í Klaksvíksgarðinum, men har er ov trongligt, og harafturat ber ikki til at byggja út har. Tí hevur felagið fingið eitt øki frá kommununi uttan fyri Norðborg. Felagið Promek byggir eisini har.

*(Kelda: Norðlýsið)*



*- Skulu menn fara burtur at arbeiða og vinna valuta til landið, má hetta eisini loysa seg – og helst loysa seg væl. Tað er hetta, sum ger, at vit hava fólk í norsku oljuvinnuni, sigur Anja Jacobsen, fyrisitingarleiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ararnir koma inn í myndina. Men tað kann eisini ganga skjótt – alt eftir, hvørjar verkætlanir, talan er um, leggur hann aftrat.

Hóast føroyingarnir í Noregi hava arbeitt og framvegis arbeiða millum fólk úr mongum øðrum londum, hava afturmeldingarnar, sum Pam Offshore Service hevur fingið, víst, at føroyska arbeiðsmegin hevur gott orð á sær.

Tí væntar skipasmiðjustjórin ikki, at føroyingarnir verða teir fyrstu, sum rúka, sum hann tekur til, tá arbeiði minkar.

### Bretland áhugavert

Anja Jacobsen, sum er fyrisitingarleiðari hjá Pam Offshore Service, sigur, at felagið eisini leitar eftir møguleikum í øðrum londum enn í Noregi, og í hesum sambandi er Bretland ein áhugaverdur marknaður.

Men her er eitt men… eitt stórt men.

- Trupulleikin er, at Føroyar og Bretland hava onga dupultskattaavtalu, og tá verður tað ikki so eggjandi hjá fólki at fara av landinum at arbeiða.

Hon vísir á, at ein slík avtala leingi hevur verið í umbúna millum londini, og fyrr enn hon er komin uppá pláss, er hesin marknaður ikki serliga áhugaverdur.

- Skulu menn fara burtur at arbeiða og vinna valuta til landið, má hetta eisini loysa seg – og helst loysa seg væl. Tað er hetta, sum ger, at vit hava fólk í norsku oljuvinnuni.

Anja sigur, at Føroyar hava dupultskattaavtalu við Noregi, sum merkir, at føroyingarnir rinda skatt í Noregi, men ikki sosialu avgjøldini, sum norskir borgarar gera.

- Hetta merkir, at lønin, teir fáa fyri arbeiði har yviri, kemur heim til Føroya sum reiður peningur og fer í umfar í Føroyum.

Lønin hjá føroyingunum í Noregi er annars hin sama, sum norska arbeiðsmegin fær – og eisini fáa føroyingar somu yvirtíð sum hinir starvsfelagarnir.

### Góðar treytir

Anja Jacobsen vísir á, at menninir, sum Pam Offshore Service hevur í Noregi, eru har yviri í 14 dagar – og síðan heima í tríggjar vikur.

- Hetta merkir, at menninir hjá okkum arbeiða í 5 holdum, soleiðis at eitt hold fer yvir – og eitt kemur heim – hvørja viku, sigur hon.

Fyrisitingarleiðarin vísir á, at nú arbeitt verður við nýggjum sáttmálum, so føroyska luttøkan í frálandavinnuni kann halda fram, er einki ómøguligt, men samstundis er heldur einki sikkurt, sum hon tekur til.

- Vit arbeiða við fleiri møguleikum, og vit vóna og vænta, at okkurt ítøkiligt spyrst burtur úr, áðrenn langt um líður, sigur Anja Jacobsen.

# Kovin sendir havtaskuhøvd og havtaskumagar til Kina

**- Trupulleikin er, at tað gongur so illa at fáa fatur á havtaskumagum, og vit høvdu verið fegnir, um fiskimenn hugsaðu um okkum, tá teir kryvja havtasku, sigur Hjalti Petersen, innkeypsleiðari hjá Kovanum í Sandavági**

FISKIÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kovin í Sandavági arbeiðir nú við eini verkætlan at senda 32 tons av havtaskuhøvdum og havtaskumagum til Kina. Virkið er í holt við at savna rávøruna til hesa ætlan, men tað gongur striltið at fáa nóg mikið av havtaskumagum.

Hjalti Petersen, innkeypsleiðari hjá Kovanum, sigur, at felagið hevur avtalu við nakrar bátar um tøku av innvølum úr havtasku. Høvdini keypir Kovin frá fiskavirkjum.

### Hyggja frameftir

- Tá hetta er á royndarstigi, kunnu vit ikki geva tað nógva fyri innvølan, og tí gongur heldur ikki serliga væl hjá okkum at fáa fatur á magum.

Innkeypsleiðarin vísir á, at ein slík verkætlan kostar virkinum pening, og tá óvist er, hvat fæst fyri vøruna í Kina, er ikki so lætt at gjalda tað nógva í fyrsta umfari.

Virkið, sum roynir at finna nýggjar vørur og nýggjar marknaðir, kann ikki seta seg í stóra skuld í sambandi við eina slíka verkætlan.

- Tað er nú einaferð soleiðis við øllum nýggjum, men vit - og eisini skipa- og bátaeigarar - mugu duga at síggja longur fram og vóna, at hetta í framtíðini verður eitt íkast, bæði hjá fiskimonnum og okkum, sum nú skulu gera royndirnar.

### Høvd og innvøli

Hjalti Petersen sigur, at kinverjar vilja hava havtaskuhøvd, sum viga meira enn 3 kilo, og tá er talan bert um ravarnar - og ikki kjálkarnar á høvdinum.

- Havtaskuhøvdini og magarnir hoyra saman í hesi verkætlan, tí kinverjar vilja hava bæði. Lutfallið er 27 tons av havtaskuhøvdum og 5 tons av magum.

Hann sigur, at rávøran verður fryst og send av landinum saman.

Enn hevur Kovin bert fingið eini 1500 kilo av havtaskumagum, og tí gongur helst rúm tíð, áðrenn sendingin kann fara av landinum.

- Trupulleikin er sum nevnt, at tað gongur so illa at fáa fatur á magum, og vit høvdu verið fegnir, um fiskimenn hugsaðu um okkum, tá teir kryvja havtasku.

Hjalti vísir á, at kinverjar vilja ikki hava havtaskuravarnar, um teir ikki eisini fáa magarnar.

- Tað er onkur suppa, teir gera burtur úr hesum. Teir fylla magarnar, sum síðan verða kókaðir saman við høvdunum. Í hesi framleiðslu kunnu vit slett ikki verða við.

Hann sigur, at kinverjar hava havtasku sjálvir, men sum tey á Kovanum hava skilt, er tað ein onnur havtaska, sum fæst í føroyskum sjógvi.

- Tí verður hendan eisini seld til heilt aðrar keyparar, leggur hann aftrat.

### Livur og rogn

Hjalti Petersen vísir eisini á, at fiskimenn eru nógv óførari at taka livur enn fiskamagar, tí tað gevur skipum og bátum eyka fiskidagar, um teir taka livrina til lands.

- Vit hava kortini skilt, at arbeitt nú verður við einum uppskoti, sum kemur at merkja, at fiskimenn eisini skulu fáa eyka fiskidagar fyri tøku av magum.

Hann sigur, at Kovin hevur ringt bæði til reiðarar og skiparar um tøku av rognum.

- Ikki minst reiðarar eru positivir - og flestu skiparar eisini - men tá saman um kemur, kemur ov lítið av hesi rávøruni til lands, sigur innkeypsleiðarin.

Hóast prísurin á rognum hevur verið rættiliga góður í vár, hevur Kovin higartil keypt lutfalsliga smáar nøgdir.

Kryvjimaskinan, sum nú er umborð á flestu ísfiskatrolarum, er ein bági fyri rogna-og livratøku, tí hon fer so illa við innvølanum.

- Prísurin á upsarognum liggur um 12 krónur fyri kilo, meðan prísurin á toskarognum í vár er komin heilt upp í einar 25 krónur fyri kilo, sigur Hjalti Petersen.



*- Havtaskuhøvdini og magarnir hoyra saman í hesi verkætlan, tí kinverjar vilja hava bæði. Lutfallið er 27 tons av havtaskuhøvdum og 5 tons av magum. Tað er onkur suppa, teir gera burtur úr hesum. Teir fylla magarnar, sum síðan verða kókaðir saman við høvdunum, sigur Hjalti Petersen, innkeypsleiðari hjá Kovanum í Sandavági*